



Steypavinnarar 2003

# VB & Kyndil



*Enn hevur hann bert verið hálvt ár í Føroyum, men leygardagin fekk Aivaras Daugis fyrsta steypið sum VB-venjari, og longu nú tykist kósin vera sett móti tí næsta*



*Skeggið skal vekk. Kyndils-leikararnir vóru heldur síðir um andlitið undan dystinum, men tað hevði sína frágreiðing. Fyri nakað síðani góvu teir tað lyfti, at teir skuldu ikki rakast, fyrr enn liðið aftur hevði vunnið, og flestu av leikarunum høvdu rakibløðini við niðan í høllina*



Eina ferð enn út á dekkið. Jónleif Sólsker kom, sá og sigraði í sínum seinasta dyst fyri besta mansliðið hjá Kyndli

*Fagnaðurin var ovurstórur, tá VB loksins hevði tryggjað sær steypaheitið. Tvær ferðir innan trý tey seinastu árini hava tær tapt finaludystin, men triðju ferð eydnaðist*





*Meðan VB-kvinnurnar vóru á veg suður til stórfingna móttøku, var Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, uppi í Ítróttarhøllini, har hann handaði Kyndli blómutyssi*



*Sigursvandu kyndils-áskoðararnir hava bíðað leingi eftir steypinum. Ikki síðani steypasigurin í 2000 hevur mansliðið vunnið nakað, so fagnaðurin eftir dystin var skilligur*



*Steypavinnarar. Janus Einar og Hans Áki lata ongan iva vera um, hvør átti dagin*



UTTAN ÚR HEIMI

# Fyrst Saddam, so Arafat

**Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, sigur, at hann fer at gera tað, sum gerast kann fyri at fáa Yasser Arafat beindan burtur**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Samstundis sum amerikanarar fyrireika seg til at reka irakska forsetan, Saddam Hussein, frá, hevur ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, kunngjørt, at hann ætlar sær at geva palestinska leiðaranum, Yasser Arafat, somu lagnu.

- Tann nýggja stjórnin fær eina trupla uppgávu, og tað er bardagin ímóti yvirgangi og leiðaranum hjá palestinsku sjálvsstýrismyndugleikunum, segði Sharon um vikuskiftið. Hann legði afturat, at fáa palestinar eina nýggja leiðslu, fer tað at bera til at tosa um frið við teir.

Ísraelska blaðið Yediot Aharonot skrivaði í gjár, at amerikanski forsetin, George W. Bush, tekur undir við ætlanini hjá Sharon. Teir báðir eru á einum máli um, at fyrst skal Saddam Hussein fáast burtur, og at síðani eigur Arafat tørn, skrivaði blaðið.

- Vit fara at reka Arafat burtur, og amerikanarar hava sagt, at teir taka undir við tí. Hvítu Húsini meta ikki Arafat øðrvísi enn Saddam Hussein. Hvør er verri enn annar, skrivaði Yediot Aharonot frá tí, sum blaðið kallar týðandi ísraelskar keldur.

Ísraelskir og amerikanskir embætismenn hava leingi sagt, at Arafat eigur at fara frá, men hesum kravi hava teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir víst aftur. Teir vísa á, at tað palestinska fólkið hevur valt Arafat til leiðara, og at tað eru einans palestinar, sum kunnu gera av, hvør skal vera teirra leiðari.

# CIA-yvirmenn ávara ímóti kríggi

**Fleiri fyrrverandi yvirmenn í amerikansku fregnartænastuni ávara Bush-stjórnina ímóti at fara í kríggj við Irak. Teir siga, at eitt tílíkt kríggj fer at gera gjónna millum Vesturheimin og tann islamska heimin uppaftur breiðari, og at tað fer at økja vandan fyri yvirgangi**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Fyrrverandi CIA-yvirmenninir vísa á eina frágreiðing, sum leiðslan í fregnartænastuni handaði Bush-stjórnini seinasta heyst. Í frágreiðingini mælti CIA frá at leypa á Irak.

Í frágreiðingini var millum annað ein meiningakanning, har 10.000 muslimar í níggju londum høvdu fingið ymsar spurningar. Niðurstøðan hjá CIA var, at amerikanska stjórnin ger ov lítið við at kanna, hví víðgongdir muslimar skipa fyri yvirgangi, og fregnartænastan ávaraði um, at eitt álop á Irak fer at skapa gróðrarbotn fyri nýggjum yvirgangsfelagsskapum.

Teir fyrrverandi CIA-yvirmenninir halda lítið um próvtilfarið, sum Colin Powell, uttanríkisráðharri legði fyri ST-trygdarráðið í síðstu viku. Teir undrast á, at USA tvíheldur um samtykt nummar 1441 um Irak, meðan Bush-stjórnin als ikki nevnir allar hinar ST-samtyktirnar, sum ikki verða hildnar.



*Seinastu dagarnar hava túsundtals irakar gingið mótmælisgongu ímóti amerikansku álopsætlanini. Flestu mótmælisfólkini bóru vápn sum hendan kvinnan, ið hevði ein granatvarpara*

Teir bera eisini ótta fyri, hvat Saddam Hussein fer at gera, leypa amerikanarar á Irak.

- Tað kann væl henda, at hann fer at hevna álopið við at hjálpa víðgongdum islamskum yvirgangs-monnum at søkja at málum í USA, og tað er als ikki óhugsandi, at yvirgangsmenninir fara at nýta hópoyðingarvápn í hesum álopunum, skriva fyrrverandi CIA-yvirmenninir.

- Vit kenna okkum sannførdar um, at eitt álop á Irak fer at bera í sær, at ungir menn í hópatali fara at bjóða seg fram sum yvirgangsmenn, skriva CIA-yvirmenninir.

## Av og á

Júst sum danir hildu, at tað var eydnast teimum at fáa tangaskipið Acushnet leyst av einum sandrivi við oynna Samsø, tók skipið aftur botn og varð standandi. Í gjárkvøldið var ætlanin at royna at fáa skipið leyst aftur.

Acushnet fór á sandrivið eystan fyri Samsø fríggjamorgunin. Skiparin ætlaði at fáa skipið leyst við egnari megi, men tað vildu donsku myndugleikarnir ikki loyva honum, tí teir bóru ótta fyri, at skipið kundi fáa skaða. Í tangunum á skipinum eru 35.000 tons av olju. Um vikuskiftið vórðu 1.700 tons pumpað umbortð í eit annað skip, og tá eydnaðist at fáa skipið leyst. Men løtu seinni tók tað aftur botn.

Donsku myndugleikarnir hava boðað skiparanum frá, at skipið sleppur ikki at halda ferðina fram, fyrr enn botnurin er kannaður. Tað skal gerast í Kalundborg-fjørðinum, tá skipið einaferð kemur hagar.

## Burtur við tollinum

Fiskiídnaðinum í ES-londunum vantar fisk, og ídnaðurin hevur tí biðið ES-nevndina strika tollin, sum verður lagdur á norskan fisk, tá hann verður fluttur á ES-marknaðin.

Tað merkir, at fiskiídnaðurin í ES tekur undir við norsku fiskivinnuni, sum í mong ár hevur strongt á fyri at fáa tollin strikaðan. Varastjórin í norska fiskiídnaðarfelagnum, Matthias Keller, sigur, at ídnaðurin í ES-londunum hevur stóran tørv á meiri fiski, og at ídnaðurin ætlar sær at keypa meiri fisk úr londum, sum eru uttan fyri samveldið.

Nú Noreg, Ísland og Liktinstein samráðast við ES um ein nýggjan sáttmála, hevur norska stjórnin kravt, at tollurin á fiskavørum verður strikaður, og norski samráðingarleiðarin, Bjørn T. Grydeland, fegnast um, at norðmenn nú fáa stuðul frá fiskiídnaðinum í ES í hesum kravi.

## Láturligt

Irakski andstøðuleiðarin Ahmed Chalabi heldur lítið um ætlanina hjá Týsklandi, Fraklandi og Russlandi at senda fleiri vápnaeftirlitsmenn til Irak. Ætlanin er láturlig, sigur hann.

Chalabi sigur, at tað eru hópoyðingarvápn, sum tryggja Saddam Hussein, forseta valdið í Irak, og tí fer forsetin ongantíð at avdúka øll síni vápn. At senda nakrar eftirlitsmenn afturat til Irak at leita, gevur onga meining, sigur Ahmed Chalabi.

Chalabi er formaður í útlagna irakska felagsskapinum Irakska Tjóðskaparkongressin, og hann tykist vera tann av útlagnu iraksku leiðarunum, sum hevur fingið serliga gott samband við amerikansku stjórnina. Chalabi hevur fyrr roynt at savna allar felagsskapirnar hjá útlagnum irakum, men uttan úrslit. Fleiri av hinum felagsskapunum halda, at hann ger ikki annað enn tað, sum amerikanararnir biðja hann gera.

## Heldur ikki hesaferð

Um vikuskiftið var forsetaval í Montenegro, men valið mátti ógildast, tí valluttøkan var ov lítil. Lógin krevur, at minst 50 prosent av veljarunum atkvøða.

Tað er aðru ferð, at hetta hendir. Tann 22. desember var eisini forsetaval í Montenegro, men tá noyddust myndugleikarnir at ógilda valið og at royna eina ferð afturat. Tað varð so gjørt um vikuskiftið, men úrslitið var einki frægari. Hesaferð vóru 47,1 prosent av veljarunum á vali, og úrslitið kann tí ikki nýtast.

Á valinum tann 22. desember fekk Filip Vujanovic heili 84 prosent av atkvøðunum, men tað hjálpti kortini ikki. Í Serbia hava myndugleikarnir sama trupulleika. Har hava fólæk valt forseta tvær reisur í seinastuni, og hóast Vojislav Kostunica hevur fingið flestar atkvøður báðar ferðirnar, er hann ikki valdur, tí ov fá fólk hava verið á vali.